Heilsumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	17.09.2020
Mál nr.:	20/00521-33
Málsviðgjørt:	GMM
Eftirkannað:	10.07.2020

Uppskot til løgtingslóg um royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15 og 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi

Uppskot til

Løgtingslóg
um
royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15 til 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at seta royndarskipan í verk um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15 til 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi.

§ 2. Kommunulækni kann ávísa til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð sambært § 1 hjá sálarfrøðingi, sum virkar sambært sáttmála við Heilsutrygd.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um ávísing til viðgerð, tal av viðgerðum o.tíl.

§ 3. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2022.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Ein arbeiðsbólkur undir leiðslu av Heilsumálaráðnum handaði í fjør eitt tilmæli um skipan við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð. Yvirskipað var niðurstøðan og tilmælið hjá bólkinum, at farið varð undir eina royndarskipan undir Heilsutrygd við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð fyri ung og vaksin í aldrinum 15 til 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi.

Talan er um eitt mál, sum landsstýrið hevur raðfest, og játtan er í ár sett av á fíggjarlógini til at fáa sett tilboðið í verk. Arbeiðið við at seta tilmælið í verk hevur tikið longri tíð enn ætlað, orsakað av koronustøðuni, men við hesum lógaruppskoti verða neyðugu lógarkarmarnir fingnir uppá pláss.

1.2. Galdandi lóggáva

Ongin galdandi lóggáva er, sum heimilar ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð í sambandi við angist ella lætt til moderat tunglyndi. Heilsutrygdarlógin heimilar ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð, um persónur hevur verið úti fyri einari av níggju hendingum, ásettar í kunngerð nr. 150 frá 6. desember 2011 um fíggjarligt ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi, sum broytt við kunngerð nr. 29 frá 4. apríl 2016. Heldur enn at broyta í heilsutrygdarlógini, so at heimild fæst til at veita ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til persónar millum 15 til 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi, verður mett rættast at gera eina nýggja lóg og hartil hoyrandi kunngerð, við tað, at talan er um eina royndarskipan.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at fáa ta neyðugu heimildina til at seta royndarskipan í verk um ókeypis sálarfrøðiligaviðgerð til persónar millum 15 til 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi. Viðgerðin verður veitt av privatstarvandi sálarfrøðingum, sum virka sambært sáttmála við Heilsutrygd, og er tað kommunulækni, sum kann ávísa einum persóni til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð. Orsøkin til at tilboðið skal fevna um persónar í aldrinum 15 ár og eldri er tann, at tað sambært § 17 í kongligari fyriskipan nr. 821 frá 22. juni 2018 um Sundhedsloven er ásett, at persónar millum 15 til 17 ár sjálvir kunnu geva "informeret samtykke" til viðgerð. Sostatt kunnu hesir persónar sjálvir fara til kommunulækna og biðja um ávísing til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð. Harafturímóti kunnu persónar yngri enn 15 ár ikki sjálvir biðja um viðtalu hjá kommunulækna ella geva "informeret samtykke" til viðgerð. Í slíkum førum er tað foreldramyndugleikaánarin, ið skal geva loyvi til viðgerð. Sostatt er eitt tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til børn og ung undir 15 ár ikki partur av hesum uppskoti, men ætlanin er at seta eitt arbeiði í verk har tað verður viðgjørt hvussu tilboðið eisini kann styrkjast til hendan yngra málbólkin.

Tað er ein rød av sálarfrøðiligum tænastum til børn og vaksin í Føroyum. Psykiatriin veitir tænastur til tey børn, ung og vaksin, ið stríðast við álvarsligar sálarligar avbjóðingar. Her er aloftast tørvur á fjøltáttaðari viðgerð, sum umframt sálarfrøðiliga viðgerð, eisini kann fevna um t.d. innleggjan á seingjardeild, heilivág, fysio- og ergoterapi og sosialar tænastur. Sum er, verða eisini fleiri sálarfrøðiligar tænastur veittar sum fyribyrgjandi fyriskipanir í

barnaverndarhøpi, og sálarfrøðilig ráðgeving verður eisini veitt í Sernám, men tá er talan ikki um viðgerð. Eisini eru sálarfrøðingar knýttir at fleiri sjálvhjálparbólkum, umframt at sálarfrøðilig viðgerð er ein týðandi táttur í allari rúsviðgerð. Tó má sigast, at bulurin í sálarfrøðiligari viðgerð til føroyingar helst eru teir privatstarvandi sálarfrøðingarnir, sum hava sáttmála við Heilsutrygd.

Føroyska skipanin við fíggjarligum ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð er rættiliga lík tí donsku skipanini á økinum, og varð av fyrstan tíð sett í verk ár 2000. Skipanin er ætlað persónum, sum hava verið úti fyri ávísum hendingum. Treytin fyri at fáa ískoyti til gjald fyri sálarfrøðiliga viðgerð er, at kommunulækni metir, at persónurin hevur verið úti fyri einari av teimum tilsamans nýggju hendingunum, sum eru ásettar í kunngerð nr. 150 frá 6. desember 2011 um fíggjarligt ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi, sum broytt við kunngerð nr. 29 frá 4. apríl 2016. Metir kommunulæknin at so er, kann hann ávísa viðkomandi til sálarfrøðiliga viðgerð. Heilsutrygd letur eitt fíggjarligt ískoyti á 40 % av gjaldinum til hesar viðgerðir. Í § 3 í sáttmálanum millum Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar og Heilsumálaráðið eru ásettar treytirnar fyri, at sálarfrøðingar kunnu virka eftir sáttmálanum við Heilsutrygd. Ein av hesum treytum er, at sálarfrøðingurin hevur eina løggilding.

Í Danmark eru fleiri broytingar framdar, síðani skipanin varð sett í verk í Føroyum. Eitt nú eru fleiri hendingar komnar afturat, m.a. strongd, tunglyndi og angist. Í juli 2018 kom í gildi royndarskipan við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð fyri tey 18 til 20 ára gomlu, sum fingu ávísing fyri angist og tunglyndi. Royndarskipanin er fram til ársskiftið 2021-2022. Tann føroyska skipanin fevnir ikki um hesar hendingar, og verður sostatt ikki givið fíggjarligt ískoyti til persónar, sum fara til privatstarvandi sálarfrøðing orsaka av angist ella tunglyndi.

Vánalig sálarlig heilsa er ein stór samfelagslig avbjóðing. Í uppgerð frá Heimsheilsustovninum WHO er niðurstøðan, at vánalig sálarlig heilsa fevnir um umleið 38 % av allari sjúku í ríku londunum. Samstundis vísa tøl gjøgnumgangandi, at meginparturin ikki fær hóskandi viðgerð. Afturat hesum kemur eisini, at viðgerðin oftast er heilivágur, hóast heilsumyndugleikar viðmæla sálarfrøðiliga viðgerð sum fyrsta val fyri mest útbreiddu avbjóðingarnar sum angist og lætt til moderat tunglyndi. Harumframt ynskja flestu borgarar sjálvir sálarfrøðiliga viðgerð heldur enn heilivág. Við støði í hesum hava nógv av okkara grannalondum framt stórar íløgur í ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð. Kendastu dømini eru Bretland, Norra, Svøríki og Holland, men eisini verða nógvar royndir gjørdar í Danmark og Íslandi. Høvuðsorsøkin er sjálvsagt, at fólk sleppa av við líðingina og koma fyri seg. Spurningurin kann so vera, hvat hesar íløgur kosta samfelagnum at fremja. Fleiri og stórar greiningar koma til somu niðurstøðu, sum er, at ókeypis sálarfrøðilig viðgerð skjótt sparir seg innaftur, við tað at fólk koma aftur til arbeiðis.

Í mun til flestu likamligu fólkasjúkurnar, so raka sálarligu avbjóðingarnar í stóran mun borgarar í arbeiðsføra aldrinum. Avbjóðingarnar eru orsøk til, at fleiri borgarar eru uttan arbeiði, og at fleiri eru noydd at arbeiða niðursetta tíð. Harafturat er sálarlig sjúka mett at vera orsøk til umleið 40 % av allari sjúkrafráveru.

Afturat omanfyrinevnda kemur, at fólk við sálarligum avbjóðingum í størri mun nýta likamligar heilsutænastur samanborið við borgarar við góðari sálarligari heilsu, men sum annars hava somu likamligu heilsustøðu. Gransking vísur , at meirnýtslan er á umleið 50 %. Orsakirnar eru m.a., at tey, sum stríðast við sálarligar avbjóðingar, hava lyndi til minni virknan lívsstíl, fleiri ósunnar vanar, umframt stúran í sær sjálvum, sum kann vísa seg sum likamlig sjúkueyðkenni. Granskingin vísir eisini, at fáa hesir borgarar hjálp til teirra sálarligu avbjóðingar, so sparir tað seg inn aftur við lægri nýtslu av teimum likamligu heilsutænastunum.

Tað er ikki torført at skilja, at alt fleiri lond í vesturheiminum gjøgnum 00´ini og framhaldandi gera risastórar íløgur í skjóta og ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð. Í Bretlandi hevur leingi verið sagt, at ein króna í tílíkar verkætlanir gevur minst tvær krónur aftur til samfelagsbúskapin. Ein nýggj kanning úr Danmark millum ung vísir, at hvør króna til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð í primera geiranum sparir 35 krónur bara svarandi til sjúkrahúspsykiatri[1].

Tað ber tíverri ikki til alt fyri eitt at bjóða ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til allar borgarar. Angist og tunglyndi eru millum tær vanligastu sálarligu sjúkurnar, og tí eru hesar diagnosur valdar til royndarskipanina. Tó er skipanin bert egnað til persónar, ið hava lætt til moderat tunglyndi við tað, at meira álvarsamt tunglyndi krevur tyngri viðgerð sum t.d. innleggjan á psykiatriska deild og heilivág.

Tá ein royndarverkætlan verður sett í verk, verður ofta byrjað í smáum, og verður tað eisini gjørt við hesari verkætlan. Aldursbólkurin er settur til at fevna um persónar millum 15 til 35 ár. Hetta er gjørt við tí í huga, at tess fyrr sett verður inn, tess størri eru gagnligu árinini gjøgnum lívið hjá borgaranum. Ein væleydnað viðgerð hjá t.d. einum tannáringi kann fyribyrgja fleiri tilburðir seinni í lívinum og/ella fyribyrgja, at støðan versnar til meira lemjandi sálarliga sjúku.

Í tilmælinum um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð, sum varð handað politiska myndugleikanum í fjør, varð sum áður nevnt eisini mælt til at byrja við aldursbólkinum 15 til 35 ár. Spurningurin um børn og ung, yngri enn 15 ár, varð eisini viðgjørdur í sama tilmæli. Tá ið talan er um børn og ung, yngri enn 15 ár, skal atlit takast til, at foreldur og avvarðandi fáa ein størri leiklut í viðgerðini, og tí mælti bólkurin til, at *"...eitt serligt tilboð við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð til børn og ung undir 15 ár verður skipað. Hetta kann gerast við at útbyggja verandi skipanir – t.d. við at gera tað møguligt hjá øllum fólkaskúlanæmingum at fáa ókeypis sálarfrøðiligar samrøður. Ein annar møguleiki er at gera eitt tvørfakligt tilboð, savnað á einum stað, við fokus á tey børn, ið stríðast við lættar til moderatar sálarligar trupulleikar, og teirra avvarðandi, ið ikki verða hjálpt av núverandi almennu tilboðunum. Ein nýggjur arbeiðsbólkur eigur at verða settur til hesa uppgávu."* Sostatt er eitt tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til børn og ung undir 15 ár ikki partur av hesum uppskoti, men fer at verða viðgjørt fyri seg.

Tað tekur tíð at byggja tænastuna upp, at góðskutryggja viðgerðina og fáa fígging til vega. Felags fyri øll londini, sum annaðhvørt longu bjóða ókeypis viðgerð ella eru í ferð við at uppbyggja eina tílíka skipan, er, at tey øll byrja við angist umframt løttum til moderatum tunglyndi. Hesar diagnosur eru nógv tær størstu og fevna um umleið helvtina av sálarligari óheilsu. Harnæst er sálarfrøðilig viðgerð fyri júst angist og tunglyndi vísindaliga væl undirbygd. Umleið helmingurin av teimum, sum fáa viðgerð, gerast frísk og ein annar partur fær ein lætta, ið væl merkist, tó uttan at sleppa av við øll eyðkenni. Hesi úrslit eru samanberilig við flestu úrslitagóðu viðgerðirnar í heilsuverkinum.

Um samanborið verður við okkara grannalond, so er eitt gott boð, at umleið 4 % av føroyingum stríðast við angist, og onnur 4 % stríðast við tunglyndi - harav umleið 3 % við lætt til moderat tunglyndi. Tilboðið um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð skal fevna um í mesta lagi 12 viðtalur. Í royndum er tað tó stórur munur á, hvussu nógvar viðtalur, fólk ynskja og/ella hava tørv á. Miðaltalið í norsku tænastuni er 6, og í Stóra Bretlandi eru nýggjastu tølini eitt vet hægri; umleið 7 viðtalur í miðal. Harumframt søkja ikki øll viðgerð, sum lúka diagnostisku krøvini til

[1] https://samf.ku.dk/bedre-liv-for-boern-og-unge-i-danmark/program/slides/benjaminlyserena_boernogungekonference.pdf, s.9

angist ella lætt til moderat tunglyndi. Síðani er eisini ein partur, sum ynskir aðrar viðgerðarhættir sum heilivág ella viðgerðir, ið eru grundaðar á meira likamligum grundarlagi, har fokus er á t.d. rørslu, kost og hvíld.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við hesum uppskoti verður heimild fingin til vega, soleiðis at ein royndarskipan við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð til persónar millum 15 til 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi kann setast í verk, og har viðgerðin verður veitt av privatstarvandi sálarfrøðingum.

1.5. Ummæli og ummælisskjøl

Lógaruppskotið varð sent til ummælis hjá:

Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar, Heilsutrygd, Kommunulæknafelag Føroya, Kærustovni Føroya, Sinnisbata, Sjúkrahúsverk Føroya.

Hoyringarsvar er komið frá:

Heilsutrygd
Sinnisbata
Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar
Sjúkrahúsverki Føroya

Heilsutrygd tekur undir við uppskotinum, men hevur eina viðmerking til grein 3 í lógaruppskotinum. Sambært grein 3 kann kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað kærara. Heilsutrygd heldur, at ein ávísing frá kommunulækna er ein læknafaklig avgerð, sum í verandi skipan ikki kann kærast til kærunevndina. Borgarin hevur møguleika at velja sær annan kommunulækna, um hann ikki er nøgdur við egnan kommunulækna, eins og borgarin kann klaga til Landslæknan í sambandi við heilsufaklig viðurskifti.

Heilsumálaráðið tekur hesa viðmerking til eftirtektar, og strikar grein 3 í lógaruppskotinum.

Sinnisbati hevur fáar viðmerkingar til uppskotið. Sum heild tekur Sinnisbati undir við uppskotinum og heldur, at uppskotið hevur nógv jaligt innihald, sum seinni kann víðkast til aðrar aldursbólkar og sjúkrabólkar innan økið, um mett verður, at royndarverkætlanin er eydnast, tá royndartíðin er av. Sinnisbati metir, at grundgevingarnar fyri uppskotinum og innihaldið av royndarskipanini eru væl grundaðar og væl lýstar. Eisini gleðist Sinnisbati um, at enn eitt tilmæli í Heildarætlanini fyri sálarliga heilsu, sum varð handað táverandi landsstýrisfólki í heilsumálum á Altjóða Sálarheilsudegnum 10. oktober 2018 verður til veruleika.

Sinnisbati vísur eisini á, at hóast komandi tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp til ung og vaksin millum 15 til 35 ár er eitt jaligt stig á leiðini at betra um korini hjá teimum borgarum, sum kenna tað trupult í støðum, er týdningarmikið at hava í huga, at tilboðið í summum førum kann fáa við sær, at fleiri ung og vaksin, sum eru fevnd av royndarskipanini, kunnu hava/fáa tørv á psykiatriskari viðgerð. Hetta merkir sostatt, at fleiri ressursir mugu latast til útgreiningar og viðgerðartilboð/møguleikar á Psykiatriska deplinum, í økispsykiatriini og í sosialpsykiatriini undir Almannaverkinum. Hetta fyri at talið á viðgerðartilboðnum og starvsfólki kann økjast. Somuleiðis merkir hetta, at tørvur verður á eini umskipan av verandi

skaðastovuskipan, soleiðis at tey við sálarligum avbjóðingum og sum kunnu fara at hava tørv á bráðfeingis hjálp og viðgerð, kunnu sleppa framat skjótast tilber.

Sinnisbati gleðist eisini um, at hetta arbeiðið er farið í gongd, og ein arbeiðsbólkur er settur at orða eitt tilmæli, sum verður latið landsstýrismanninum í heilsumálum innan stutta tíð. Sinnisbati vónar, at tilboðið um ókeypis sálarfrøðiliga hjálp kann vera eitt lið í arbeiðinum at menna og byggja undir fleiri fyribyrgjandi átøk, sum arbeitt verður við, og sum tørvur verður á nú og frameftir. Hetta fyri at lofta sárbærastu bólkunum úr lívsumstøðum, sum við skjótari hjálp og/ella viðgerð, kann fyribyrgjast og byrgja fyri kroniskum líðingum.

Samanumtikið er Sinnisbati jaligt um uppskotið og fortreytirnar, umframt at felagið fegnast um, at vit eru komin enn eitt fet á leiðini at viðurkenna menniskju við sinnisligum avbjóðingum í føroyska samfelagnum.

Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar taka yvirskipað undir við uppskotinum til løgtingslógina, soleiðis sum tað er orðað.

Felagið hevur tó viðmerking til orðingin í § 2 um, at kommunulækni kann ávísa til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð sambært § 1 hjá sálarfrøðingi, sum virkar sambært sáttmála við Heilsutrygd. Felagið vísur á, at tað stendur aðrastaðni í uppskotinum, at ætlanin er at seta í verk eina skipan, sum gevur lætta og skjóta atgongd til viðgerð. Eisini vísur felagið á, at tað m.a. varð viðgjørt í arbeiðsbólkinum, sum gjørdi tilmælið, at tað ikki er víst, at tað er lættast og skilabest at lata kommunulæknan vera inngongd til nýggju skipanina, tí tað fer við eyka tíð og umsiting.

Heilsumálaráðið metir tað vera skilabest at lata kommunulækna ávísa til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð. Hetta varð eisini mælt til í tí tilmæli, sum felagið vísir til omanfyri, og sum varð handað í fjør. Tá royndarverkætlanin skal eftirmetast, kann støða eisini takast til, um tað framhaldandi skal vera kommunulækni sum ávísur, um so er at skipanin við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð skal halda fram.

Felagið vísur eisini til § 2 í uppskotinum, har tað stendur, at sálarfrøðingurin skal virka eftir sáttmála við Heilsutrygd. Her metir felagið, at tað er meiri umráðandi, at sálarfrøðingarnir lúka somu *treytir* sum teir, ið hava sáttmála við Heilsutrygd, uttan at teir neyðturviliga eru teir somu, sum nú hava sáttmála við Heilsutrygd. Eitt nú er tað ein treyt, at sálarfrøðingarnir hava løggilding. Felagið metir tað vera umráðandi, at lógin ikki læsir skipanina, tí hetta er hóast alt ein royndarverkætlan, har endamálið eisini er at finna fram til, hvussu tað á ein smidligan hátt fyri borgaran verður skipað.

Heilsumálaráðið heldur fast við, at sálarfrøðingurin skal virka eftir sáttmála við Heilsutrygd. Vísur tað seg, at eftirspurningurin eftir ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð er so mikið stórur, at sálarfrøðingarnir, sum virka sambært sáttmála við Heilsutrygd, ikki megna at nøkta tørvin, kann støða takast til, hvørt víkjast kann frá kravinum um sáttmála við Heilsutrygd.

Felagið fyri Føroyskar Sálarfrøðingar vísur á, at tað í almennu viðmerkingunum á síðu 10 í uppskotinum stendur soleiðis *"Sálarfrøðingurin velur sjálvur sína tilgongd í mun til viðgerðarhætt, men tað er ein treyt, at hátturin er "bona fide"; tvs. at hann er ætlaður at viðgera ávísar sálarligar trupulleikar- í hesum føri angist og lætt til moderat tunglyndi, og at sálarfrøðingurin hevur teir neyðugu førleikarnar og útbúgvingarstigið."* Felagið skjýtur upp heldur at nýta hesa orðing *"Sálarfrøðingurin velur sjálvur sína tilgongd í mun til*

viðgerðarhætt, men tað er ein treyt, at hátturin er "bona fide"; tvs. at hann er ætlaður at viðgera ávísar sálarligar trupulleikar- í hesum føri angist og lætt til moderat tunglyndi." Í tilmælinum, sum varð handað í fjør er staðfest, at sálarfrøðingarnir eiga at hava løggilding, og tá metir felagið eisini, at sálarfrøðingurin hevur teir neyðugu førleikarnar og útbúgvingarnar.

Heilsumálaráðið tekur hesa viðmerking til eftirtektar og broytir orðingina í teimum serligu viðmerkingunum til § 2, stk. 1.

Í eyka viðmerkingum frá felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar verður vist á, at tað hevði verið ynskiligt, at uppskotið eisini fevndi um børn og ung undir 15 ár. Felagið vísir í hesum sambandi á, at nógv børn og ung eru ikki fevnd av núverandi skipanum og tilboðum, um ikki familjurnar hava ráð at gjalda fyri tað, og tí metir felagið, at skipanin eisini átti at loyvt børnum, yngri enn 15 ár, at fáa ókeypis viðgerð.

Heilsumálaráðið kann í hesum sambandi viðmerkja, at spurningurin um børn og ung, yngri enn 15 ár, eisini varð viðgjørdur í tilmælinum um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð, sum varð handað politiska myndugleikanum í fjør. Arbeiðsbólkurin mælti til, at skipanin um ókeypis viðgerð varð bygd stigvíst upp, og at byrja varð við teimum ungu og vaksnu millum 15 og 35 ár. Tá ið talan er um børn og ung, yngri enn 15 ár, skal hædd takast fyri, at foreldur og avvarðandi fáa ein størri leiklut í viðgerðini. Tí mælti bólkurin til, at "...eitt serligt tilboð við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð til børn og ung undir 15 ár verður skipað. Hetta kann gerast við at útbyggja verandi skipanir – t.d. við at gera tað møguligt hjá øllum fólkaskúlanæmingum at fáa ókeypis sálarfrøðiligar samrøður. Ein annar møguleiki er at gera eitt tvørfakligt tilboð, savnað á einum stað, við fokus á tey børn, ið stríðast við lættar til moderatar sálarligar trupulleikar, og teirra avvarðandi, ið ikki verða hjálpt av núverandi almennu tilboðunum. Ein nýggjur arbeiðsbólkur eigur at verða settur til hesa uppgávu." Sostatt er eitt tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til børn og ung undir 15 ár ikki partur av hesum uppskoti, men fer at verða viðgjørt fyri seg.

Depilsleiðslan á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum nevnir, at uppskotið um royndarskipan er rættuliga líkt teirri skipan, sum varð sett í verk í Danmark fyri nøkrum árum síðani. Í hesum sambandi vísa tey til tekstin í Heildarætlan fyri sálarliga heilsu í Føroyum, har m.a. verður sagt: "Tilboðið skal grundast á bestu royndirnar frá øðrum londum og verða lagað til føroysk viðurskifti." Hóast hetta, metir depilsleiðslan, at danska royndarskipanin í stóran mun verður kopierað. Út frá hesum sæst ikki, at eftirmetingarnar av tí skipanini eru tiknar við.

Heilsumálaráðið skal við hesum vísa á, at eftir at Heildarætlanini um sálarheilsu varð handað politiska myndugleikanum í 2018 varð ein arbeiðsbólkur settur at koma við tilmæli um, hvussu tilmælið um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð kundi setast í verk. Arbeiðsbólkurin metti um skipanir í øðrum londum og mælti síðani til eina skipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til ung og vaksin millum 15 til 35 ár, sum kommunulækni skuldi ávísa til. Tað er hetta tilmælið, sum lógaruppskotið byggir á.

Talan er sum kunnugt um eina royndarskipan sum verður eftirmett. Vísir eftirmetingin, at tillagingar eiga at gerast, verður støða tikin til tað.

Eisini vísir Depilsleiðslan á, at Heilsumálaráðið hevur liggjandi eitt uppskot um "Heilsunýskipan" í primera geiranum, har m.a. verður lagt upp til at seta sálarfrøðingar í starv á heilsumiðstøðum kring landið, men onki verður nevnt um hetta í hesum uppskoti ella viðmerkingunum. Depilsleiðslan metir, at tað við lógaruppskotinum verður vald ein einskiljing

av hesari tænastuni, sum væntandi verður ein munandi dýrari loysn enn tann, sum varð lagt upp til í álitinum um Heilsunýskipan. Tá tað samstundis verður sett avmarkað upphædd av til ta tænastuna, sum her verður ásett við lóg, má metast, at tað fæst minni heilsutænasta fyri pengarnar.

Viðmerkjast skal, at í viðgerðini av hvørjum leisti, tilboðið skuldi skipast eftir, er spurningurin eisini umrøddur, hvørt hetta skuldi verða ein skipan, sum var partur av økisheilsutænastuni, eins og kliniskir dietistar eru tað. Hinvegin er hetta ein royndarskipan, sum verður eftirmett, innan tíðarskeiðið, ið lógaruppskotið fevnir um, og tá verður framtíðar leistur fyri skipanina eisini viðgjørdur.

Depilsleiðslan á Psykiatriska deplinum viðmerkir eisini, at tað í tí donsku skipanini verða settar avmarkingar í tí upphædd, sum almenna skipanin vil gjalda fyri tænastuna (pr. viðtalu), so tað ikki bara verður upp til privatu aktørarnar at áseta kostnaðin (meinlíkt tí, sum verður gjørt við aðrar tænastur, sum tað almenna veitir til privatar aktørar). Tann møguleikin verður ikki nóg væl tryggjaður í § 2 í lógaruppskotinum (har ein møgulig prísáseting má koma undir ”o. tíl.”).

Heilsumálaráðið skal vísa á, at tað í § 2, stk. 1 stendur, at sálarfrøðingurin skal virka sambært sáttmála við Heilsutrygd. Sostatt verður tað ikki upp til teir privatu aktørarnar at áseta kostnaðin, eins og tað verður gjørt í tí donsku skipanini. Í sáttmálanum millum Heilsutrygd og sálarfrøðingarnar er ásett, hvør tímatakstur er fyri viðgerð hjá privatstarvandi sálarfrøðingi. Tí er kostnaðurin fyri hvørja viðgerð kendur frammanundan. Heilsumálaráðið metir tí ikki, at neyðugt er við prísáseting í sjálvum lógaruppskotinum.

Leiðslan í Barna- og ungdómspsykiatriini er eisini komin við sínum viðmerkingum til uppskotið. Leiðslan mælir millum annað til, at tilboðið um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð eisini skal fevna um børn og ung, yngri enn 15 ár. Í hesum sambandi mæla tey samstundis til, at foreldrini og familjan gerast partur av viðgerðini hjá hesum málbólki.

Heilsumálaráðið skal í hesum sambandi vísa til viðmerkingarnar omanfyri um tað sama. Har varð víst á, at eitt tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til børn og ung undir 15 ár ikki er partur av hesum uppskoti, men fer at verða viðgjørt fyri seg.

Eisini mælir leiðslan í Barna- og ungdómspsykiatriini til, at teir sálarfrøðingar, sum skulu viðgera børn og ung sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi, skulu vera útbúnir til at viðgera málbólkin.

Heilsumálaráðið skal í hesum sambandi viðmerkja, at tað er settur løggildur sálarfrøðingur sum verkætlanarleiðari undir Heilsutrygd, har høvuðsuppgávurnar verða at uppbyggja, reka, góðskutryggja og eftirmeta skipanina. Verkætlanarleiðarin hevur fakligu ábyrgdina av skipanini og fer at sniðgeva tilboðið og fyrireika teir sálarfrøðingarnar, sum skulu verða partur av skipanini. Eisini fer verkætlanarleiðarin at hava eftirlit við skipanini.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Metti kostnaðurin av royndarskipanini er í miðal 3 mió. krónur um árið yvir trý fíggjarár. 1.910 tús. kr. fyrsta árið og 3.650 tús. kr. tey tvey næstu árini.

Samgongan hevur raðfest hetta mál, og á fíggjarlógini fyri 2020 eru settar 1.8 tús. kr. av til endamálið við hesari viðmerking:
"Játtanin er til eina 3 ára royndarætlan við ókeypis sálarfrøði til 15-35 ára gomul. Royndarætlanin verður sett í verk í 2020. Ein verkætlanarleiðari verður settur hálva tíð at fyrireika og samskipa royndarætlanina. Játtanin fyri 2020 er 1,8 mió. kr. Verkætlanin verður mett at kosta 3,65 mió. kr. í 2021 og 2022".

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Nei

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Ja. Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri privatstarvandi sálarfrøðingar, tí teir fara at fáa fleiri ávísingar til viðgerðir.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Nei.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Nei.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Ja. Endmálið við royndarverkætlanini er at veita ókeypis sálarfrøðiliga hjálp til persónar millum 15 til 35 ár, sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi. Ein væleydnað viðgerð hjá hesum málbólki kann fyribyrgja fleiri tilburðum gjøgnum lívið og/ella fyribyrgja, at støðan versnar til meira lemjandi sálarliga sjúku.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongin.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Ongin.

2.9. Markaforðingar
Ongar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Nei.

2.11. Skattir og avgjøld
Nei.

2.12. Gjøld
Nei.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Nei.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Nei.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Nei.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Landsstýrismaðurin í heilsumálum fær við hesari lóg heimild til at seta royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð í verk. Tann ókeypis viðgerðin kann veitast persónum, sum eru millum 15 til 35 ár og sum hava angist ella lætt til moderat tunglyndi. Angist og tunglyndi eru millum tær vanligastu sálarligu sjúkurnar, og tí eru hesar diagnosur valdar til royndarskipanina. Tó er skipanin bert egnað til persónar, ið hava lætt til moderat tunglyndi við tað at meira álvarsamt tunglyndi krevur tyngri viðgerð, sum t.d. innleggjan á psykiatriska deild og heilivág.

Tá ein royndarverkætlan verður sett í verk, verður ofta byrjað í smáum, og verður tað eisini gjørt við hesari verkætlan. Aldursbólkurin er settur til at fevna um persónar millum 15 til 35 ár. Hetta er gjørt við tí í huga, at tess fyrr sett verður inn, tess størri eru gagnligu árinini gjøgnum

lívið hjá borgaranum. Ein væleydnað viðgerð hjá t.d. einum tannáringi kann fyribyrgja fleiri tilburðum gjøgnum lívið og/ella fyribyrgja, at støðan versnar til meira lemjandi sálarliga sjúku.

Til § 2
Stk. 1. Kommunulækni kann ávísa einum borgara til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð hjá sálarfrøðingi, ið er løggildur og sum virkar sambært sáttmála við Heilsutrygd. Borgarin kann sjálvur gera av, hvønn sálarfrøðing, sum hevur sáttmála við Heilsutrygd, hann vil til, eins og tað skal vera gjørligt at skifta sálarfrøðing í viðgerðartíðini. Sálarfrøðingurin velur sjálvur sína tilgongd í mun til viðgerðarhætt. Mælt verður tó til, at hátturin er "bona fide", t.v.s., at hann skal vera ætlaður at viðgera ávísar sálarligar trupulleikar - í hesum føri angist og lætt til moderat tunglyndi.

Stk. 2. Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um ávísingarhætt, tal av viðgerðum o.tíl. Kommunulæknar skulu fáa mannagongdir at ávísa eftir, soleiðis at tað er eins fyri allar borgarar, líka mikið, hvar í landinum ein býr. Royndarverkætlanin leggur upp til 12 ókeypis viðgerðir, sum kunnu vera einstaklingaviðgerðir ella bólkaviðgerð.

Til § 3
Áseting um gildiskomu og nær løgtingslógin fer úr gildi aftur.

Heilsumálaráðið, 17. september 2020

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

/ Turid Arge
aðalstjóri

Fylgiskjøl:

1. Heilsutrygd
2. Sinnisbata
3. Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar
4. Sjúkrahúsverk Føroya – Psykiatriski Depil
5. Sjúkrahúsverk Føroya – Barna- og ungdómspsykiatriin